Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

# Býráðið

**Dagfesting:** 11.06.2018 kl. 20:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:: Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen

Vara limir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Erik Lervig

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Behandling af udvalgssag** | | | |

| 37/18 | 18/00136-2 | Mál 18/00136 Rennifjalabreyt í Syðrugøtu. Málslýsing og tilmæli | 3 |
| 38/18 | 18/00230-2 | Prísur á grundstykkinum á vinnuøkinum í Gøtudali | 5 |
| 39/18 | 18/00216-2 | Tilboð uppá grótlaging | 6 |
| 40/18 | 18/00234-1 | Tilmæli - Broyting av tíðarfreistum undir §5 í skeyti - Byggifreistir | 7 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 41/18 | 18/00186-1 | Mál 18/00186 Litir í Leiki 2018/19. Málslýsing og tilmæli. | 8 |
| | | | |

## 37/18 Mál 18/00136 Rennifjalabreyt í Syðrugøtu. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 14.05.2018 | 50/18 | 18/00136-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 45/18 | 18/00136-2 |
| 3 Býráðið | 11.06.2018 | 37/18 | 18/00136-2 |
| 4 Mentanarnevndin | 11.06.2018 | 53/18 | 18/00136-2 |

**Málslýsing:**

Umsókn er komin inn frá áhugabólki í Syðrugøtu um stuðul til at gera eina rennifjalabreyt í Grundini. Tey rópa verkætlanina fyri "Turkihúsið í Hamferð".

Samlaði kostnaðurin er 390.000 kr. fyri alla verkætlanina. Fyrsta byggistig er at gera sjálva rennifjalabreytini, herundir tilfar, og design av sjálvari breytini. Tey søkja Eysturkommunu um stuðul til tilfar og serfrøðingahjálp til sniðgeving av sjálvari breytini. Stuðulin tey søkja um er sostatt 160.000 kr.

Tey hava søkt Mentamálaráðið um stuðul til tann listarliga partin, ið snýr seg ljósinstallatión og upplýsing at Turkihúsinum í hamferð. (sí prosjektlýsing). Arbeiðið verður gjørt sjálvboðið.

Tey meta at ein rennifjalabreyt í Grundini kundi verið til stóra gleði gjøgnum alt árið, samstundis sum hon á G! Festivalinum kann nýtast sum elektroniskur pallur um kvøldið. At standa á rennifjøl er nakað sum vindur nógv upp á seg og var eisini nakað ið fleiri av teimum ungu nevndu í samrøðunum um barna- og ungdómspolitik.

Grundin liggur á matr. nr 12 í Syðrugøtu, og Eysturkommuna eigur matrikkulin. Aðrir fyrispurningar eru eisini eftir økinum. Hesir fyrispurningar er lýstir í mál 17/00262 (fyrispurningur um at keypa "Grundina" í Syðrugøtu – gamla turkihúsið matr. 12.

-----------------

7. juni 2018

Umsitingin hevur spurt umsøkjararnar um rennifjalabreytin kann gerast soleiðis, at um okkurt annað virksemið verður í Grundini um t.d. 1 ár, kunnu tey so flyta rennifjalabreytina uttan hon skal brótast uppaftur..

Hetta letur seg ikki gera uttan verkætlanin verður gjørd annarleiðis, og harvið væntandi dýrari. Eitt av argumentunum fyri at gera verkætlanina júst á hendan mátan, er at brúka avlopsbetong. Harumframt kunnaði umsøkjarin umsitingina um, at um peningur fæst til verkætlanina, so klára tey neyvan at gera rennifjalabreytina áðrenn G! Festivalin í ár.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Søkt verður um 160.000 kr. í stuðli. Ongin játtan er til endamálið á fíggjarætlanini fyri 2018

**Tilmæli**

Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Viðtøka Mentanarnevndin 11. juni 2018**
Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul til verkætlanina og geva umsøkjarunum loyvi at byggja rennifjalabreytina í Grundina í Syðrugøtu.

Samstundis mælir Mentanarnevndin til, at heitt verður á tey, ið standa fyri verkætlanin, um at hava í huga, at gera breytina á ein slíkan hátt, at mest møguligt av henni kann flytast á annað stað, um tørvur verður á tí innan lutfalsliga stutta tíð (eini 2-5 ár).

**Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018**
Fíggjarnevndin tekur støðu til málið á býráðsfundinum

**Viðtøka Býráðið 11. juni 2018**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina og mentanarnevndina til viðgerðar.

## 38/18 Prísur á grundstykkinum á vinnuøkinum í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 46/18 | 18/00230-2 |
| 2 Býráðið | 11.06.2018 | 38/18 | 18/00230-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til skriv/teldupost frá borgarstjóranum tann 31. mei 2018. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Vinnuøkið er íalt uml 15.000 m$^2$, so um prísurin á grundstykkjunum verður lækkaður frá 300,00 kr./m$^2$ til 200,00 kr./m$^2$ verður samlaða inntøkan uml. 1,5 mió. kr. lægri enn ætlað. Á fíggjarætlanini fyri 2018 er ikki roknað við nakrari inntøku fyri sølu av grundstykkjum, so fyri fíggjarætlanini hevur tað ikki nakra avleiðing.<br><br>Samlaði kostnaðurin hjá kommununi fyri økið er uml. 800 kr. fyri m$^2$ |

| **Tilmæli** |
|---|
| Rættast er at selja grundstykkini fyri kostprís t.v.s 800,00 kr. m$^2$. Tá tað er sagt so kunnu umstøður gera at kommunan kann síggja burtur frá hesum (sum eisini verður víst á í teldupostinum frá borgarstjóranum) og t.d verða grundstykkir til sethús seld fyri 150 kr./m$^2$ sum er lægri enn kostprísur. |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at lækkað prísin frá 300,00 kr/m$^2$ til 200,00 kr/m$^2$

**Viðtøka Býráðið 11. juni 2018**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Gudny Langgaard, Árni Jacobsen, Hans Mourtis Foldbo, Brandur Jacobsen,

**Atkvødd blankt:**
Tollakur Joensen

## 39/18 Tilboð uppá grótlaging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 47/18 | 18/00216-2 |
| 2 Býráðið | 11.06.2018 | 39/18 | 18/00216-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Í sambandi við arbeiði við uttanumøkinum við býráðshúsið, hevur umsitingin biðið um tilboð uppá grótlaging framvið ánni (sí hjál. tekning). Hetta er fyrsta stig til at fríðka økið, og er hetta er gjørt í samráð við Ósbjørn Jacobsen. Tá hetta er gjørt er ætlanin at slætta økið frammanfyri húsið niðan móti Mortanstovubrekku. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini er 1 mió. kr. avsett til at fríðka økið við býráðshúsið. Men fleiri arbeiðir eru eftir at gera í sambandi við liðugtgerð av húsinum, og tí verður neyðugt við eykajáttan seinni í ár. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at tikið verður av fyriliggjandi tilboði, og at arbeiðið verður gjørt sum skjótast. |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av fyriliggjandi tilboði.

**Viðtøka Býráðið 11. juni 2018**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 40/18 Tilmæli - Broyting av tíðarfreistum undir §5 í skeyti - Byggifreistir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 11.06.2018 | 40/18 | 18/00234-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Undir §5 í skeytinum hjá Eysturkommunu, er ásett ein tíðarfreist, sum sigur at:<br><br>"Innan ½ ár frá tí, at skeytið er undirskrivað, skal byggiarbeiðið verða byrjað, og sethús skulu verða innilokað á stykkinum innan 1 ½ ár, frá tí, at skeytið er undirskrivað."<br><br>½ ár er ikki nógv tíð, tá vinnan hevur so nógv at gera, sum tað er í dag.<br>Umsitingin fær javnan umsókn borgarum, um at leingja hesa freist, tí tað er trupult at fáa handverkarar.<br><br>Tískil meta vit at tað er neyðugt at broyta hesa tíðarfreist. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at man broytir tíðarfreistina undir §5 í skeytinum soleiðis, at man hevur 1 ár at byrja uppá byggiarbeiðið, og til 2 ár til sethús skulu verða innilokað á stykkinum.<br><br>So kemur §5 í skeytinum at ljóða soleiðis:<br><br>Innan 1 ár frá tí, at skeytið er undirskrivað, skal byggiarbeiðið verða byrjað, og sethús skulu verða innilokað á stykkinum innan 2 ár, frá tí, at skeytið er undirskrivað. |

**Viðtøka Býráðið 11. juni 2018**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 41/18 Mál 18/00186 Litir í Leiki 2018/19. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.06.2018 | 54/18 | 18/00186-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 49/18 | 18/00186-1 |
| 3 Býráðið | 11.06.2018 | 41/18 | 18/00186-1 |

**Málslýsing:**

Í fjør samtykti býráðið at seta 100.000 kr. av til royndarverkætlanina Litir í leiki. Upphæddin bleiv sett av til undirvísing av einum árgang + musiktól.
Skúlastjórin letur væl at fyrsta árinum, og heldur avgjørt, at verkætlanin skal halda fram og útbyggjast við tveimum og til síðst trimum árgangum. Skal verkætlanin Litir í Leiki verða optimal skulu vit hava tríggjar árgangir sum minimum. Næsta mál er sostatt at fáa tveir árgangir.

Hvør árgangur í Litir í Leiki krevur 6 tímar um vikuna frá musikkskúlaskipanini. 6 tímar um vikuna fyrsta árið, næsta árið 12 tímar og triðja árið 18 tímar.

**Høvuðsfíggingin verður/er hendan (tveir árgangir):**

- Musikkskúlaskipanin kemur við tveimum tímum (her rindar kommunan helvtina) 11.800 x 2 árgangir= 23.600 kr.
- Lokali musikkskúlin kemur við tveimum tímum (kosta onki)
- Eysturkommuna kemur við teimum tímum (hetta betalir kommunan alt) 2 x 11.800 x 2 árgangir= 47.200 kr.

Samlaði kostnaðurin er 70.800 kr. pr. ár fyri ein árgang + koyring. Samlaði kostnaðurin fyri tveir árgangir er sostatt 141.600 kr.

Málið snýr seg um vit vilja útbyggja verkætlanina Litir í Leiki, og um musikkskúlaskipanin (MMR og lokali musikkskúlin) eru sinnað veita Litir í Leiki tímarnar. T.v.s. fortreytin er at allir partar spæla við.

7. juni 2018
Umsitingin hevur tosað við musikskúlaskipanina viðv. kostnaði av klokkutímun í skipanini. Ein klokkutími kostar 25.000 kr. um árið, tó uttan koyring.

Skal Eysturkommuna sjálv gjalda fyi ein árgang við "Litir í Leikii" er kostnaðurin fylgjandi:

6 næmingar verða í "Litir í Leiki" og tey fáa ein hálvan undirvísingartímar í part + ein tíma við felagundirvísing.
Hetta er sostatt 4 undirvísingartímar og er kostnaðurin sostatt 4 tímar x 25.000 kr. = 100.000kr.

Ferðingin hjá undirvísaranum er: 131,94km x 3,20kr = 16.044kr.

6 ljóðfør á 4000 kr. pr. stk. = 24.000 kr.

Samlaður prísur fyri ein árgang í Litir ít Leiki er sostatt: **140.044 kr.**

| |
|---|
| |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum. |

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 11. juni 2018</u>**
Mentanarnevndini mælir til, at umframt verandi árgang í Litir í Leiki, so skal Litir í Leiki eisini fevna um næmingur sum byrja í 1. flokki í august 2018. (Víst verður til skjalið "Uppgerð HMF").

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**<u>Viðtøka Býráðið 11. juni 2018</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

fundurin lokin kl. 21.00

Jóhan Christiansen

Hanna Jensen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen